


FULL FÓLK

*Løgreglan hevur havt úr at gera hetta vikuskiftið og tað mesta av arbeiðsorkuni er farin til at hjálpa fullum fólki*

# Løgreglan hjálpti fullum fólki í hópatali

**LØGREGLA** Løgreglan hevur havt eitt øgiliga strævið vikuskifti, har serliga full fólk hava elvt til stórar trupulleikar

Áki Bertholdsen

Um mánaðarskiftið, tá ið lønir og studningar verða útgoldnir, hevur Løgreglan sum oftast øgiliga nógv at gera.

Hetta er eitt rák, sum vindur upp á seg, hevur løgreglan lagt merki til.

- Tað vísir seg, at tá ið fólk hava fingið løn og studning síðst í mánaðinum, er altíð nógv meiri hjá okkum at gera enn vanligt, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.

Hetta vikuskiftið hevur sanniliga ikki verið nakað undantak.

- Tað hevur verið strævið hjá teimum, sum hava verið til arbeiðis, sigur vakthavandi løgreglumaður í morgun.

Tað eru serliga full fólk, sum hava elvt til trupulleikar.

- Tað vísir seg, at vikuskiftini um mánaðarskiftini eru tað nógv fleiri fólk enn vanligt, sum drekka seg frá viti og skili og tað sæst aftur í rapportini hjá løgregluni.

**Full fólk**

Hetta vikuskiftið hevur løgreglan nevniliga tikið eitt ótal av fullum fólki upp og koyrt tey til húsar.

Tað hevur eisini onkur dømi verið húsaófriður, har løgreglan mátti upp í og onkrar ósemjur hava eisini verið á gøtuni.

Tað eru somueiðis fleiri dømi um, at fólk eru dottin og eru komin til skaða. Eini tvey hava brotið beinið og onnur hava skorið seg av glasi. Løgreglan mátti eisini bjarga einum, sum var fallin í óvit tí hann hevði tikið ov nógvan heilivág.

Onkur einstakur er eisini lagdur í brummuna at sova rúsin av sær.

Afturat hesum koma so aðrar vanligar uppgávur sum at taka sær av klagum um leys djór um annað.

Og tíðliga sunnumorgin varð herverk í prestagarðinum í Sandágerði, har ein stór grein varð brotin av einum træi.

aki@sosialurin.fo

## STJÓLU 3000 KRÓNUR

Um vikuskiftið vóru 3000 krónur, umframt ymiskt annað, stolið úr einum bili á Skálarøð. Ongi tekin eru um innbrot, so løgreglan sigur, at helst stóð bilurin ólæstur. Tað málið kannar løgreglan so eisini.

Annars varð brotið inn í ein annan bil, men har varð onki stolið.

## Álvarligan skaða í ferðsluóhappi

Ein ungur maður mátti flytast á Ríkissjúkrahúsið eftir eitt álvarsligt ferðsluóhapp á Sundsvegnum sunnunáttina.

Tveir mans komu koyrandi á prutli oman eftir Sundsvegnum, tá ið teir rendu saman við ein bil, sum teir vildu yvirhála í tí hann skuldi snara inn í Gæsugøtu.

Stoyturin var so harður, at báðir menninir vórðu slongdir av prutlinum og serliga var illa statt við øðrum teirra, sum lá lívleysur á vegnum.

Á Landssjúkrahúsinum varð staðfest, at hann hevði fingið skaða í høvdið og at støðan var kritisk, men stabil. Hinvegin var skaðin so álvarligur, at maðurin mátti flytast í Ríkissjúkrahúsinum.

Hin maðurin varð útskrivaður aftur sunnudagin.

## Spældu við eld

Seinnapartin fríggjadagin var sløkkiliðið boðsent oman á havnarlagið á Toftum, har eldur var í eini ruskbingju.

Tað vísti seg, at talan var um nakrar smádreingir, sum høvdu spælt við eld og tað elvdi til, at eldur kom í bingjuna.

Ongin skaði hendi, men alt í bingjuni kolaðist upp, uttan at nakar annar skaði stóðst av hesum.

## Fleiri mist koyrikortið um vikuskiftið

Hetta vikuskiftið hevur løgreglan kanna fleiri bilar og ein avleiðing av tí er, at koyrikortið hjá fleiri bilførarum er í vanda.

Sum tað sæst í aðrari grein, hevur løgreglan havt út at gera hetta vikuskiftið og tað hevur eisini merkt ferðsluna.

Í Kaldbaksbotni og aðrastaðni svar løgreglan í fleiri umførum um vikuskiftið og máldi, hvussu skjótt bilar koyrdu ymsastaðni. Í tí sambandi varð ein tikin, sum koyrdi 124 km um tíman, ein varð tikin fyri at koyra 117, ein koyrdi 115 og ein 110, so teir mugu allir fýra nú taka koyrikortið av nýggjum.

Somuleiðis eru tveir bilførarar tiknir fyri at koyra við kenning og hann má so eisini upp til nýggja koyriroynd.

Annars fekk ein bilførari klipp í koyrikortið fyri at yvirhála beint við bergholið í Kaldbaksbotni, har tað annars ikki er loyvt av yvirhála.

## Mistu olju á sjógv

Leygardagin varð boðað frá, at ein oljublettur varð á sjónum við Vestarubryggju. Tað varð ein bátur, ið lá við Oljuhavnina, sum hevði mist "eina minni nøgd" av olju á sjógv. Tað er ikki greitt um talan var um bunkring ella um tað vóru aðrar orsøkir. Men Løgreglan hevur so tikið málið upp og tað gongur so sína gongd.